## Gott fótbóltslag í Noregi

Fótbóltshugaðir norðmenn eru í góðum hýri í hesum døgum. Tað eru teir, tí Noreg leygarkvøldið vann heili 4-1 á útivølli í Budapest móti Ungarn.

Norðmenn eru eisini í góðum hýri, tí teir halda, at teirra landslið í 1. hálvleiki spældi betri, enn teirra landslið nakrantíð áður hevur gjørt á útivølli.

Og norðmenn eru ikki minst í góðum hýri, tí best umtókti norski landsliðsspælarin nógvu tey seinastu árini, Ole Gunnar Solskjær, vísti, at hann er komin fyri seg aftur, eftir at hann leingi hevur verið skaddur. Ole Gunnar Solskjær skoraði fyrsta málið. Noreg var á odda 3-0, og Ole Gunnar Solskjær økti til 4-0, áðrenn Ungarn pyntaði um úrslitið við brotssparki.



## Tepur hollendskur sigur á Luksemborg

Luksemborg verður roknað at vera á umleið sama fótbóltsstøði sum Føroyar. Í gjár gekk væl betri hjá Luksemborg, enn tað gjørdi hjá Føroyum, men tað eydnaðist kortini ikki Luksemborg at fáa stig burturúr. Luksemborg hevði vitjan av Hollandi. Liðið hjá Marco van Basten var í nýggjari útgávu, um sammett verður við HM endaspælið. Holland hevði nógv spæl, men tað eydnaðist teimum bara at vinna 1-0. Málið skoraði miðverjin Joris Mathijsen eftir returbólt frá málverjanum. Hetta var fyrsta altjóða málið hjá verjuspælaranum.

# hálvt hundrað túsund



*Tað var 6-0. Tennis eggið frá Georgia á heimavølli var endurtikið, og kilturin var pilkaður av føroyska liðnum, sum var heilt groggy, men tíbetur slapp so nøkulunda burturúr seinna hálvleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

sum hann neyvan hevði brísklað fyri, um Italia ella Frakland var mótstøðuliðið, so var tað bara ein spurningur um, hvussu stórt tapið fór at vera.

Tað var 6-0. Tennis eggið frá Georgia á heimavølli var endurtikið, og kilturin var pilkaður av føroyska liðnum, sum var heilt groggy, men tíbetur slapp so nøkulunda burturúr seinna hálvleiki.

### Lítil lærdómur

Vit eru við fyri at læra, hevur so ofta verið tikið til síðani Føroyar í 1990 fyrstu ferð luttóku í altjóða kapping.

Lærdómurin hevur áður verið til at fingið eyga á, men avrikið á Celtic Park leygardagin staðfesti, at nógv er eftir at læra hjá nýggja ættarliðnum og ikki minni teimum, sum nú eru teir royndastu og harvið skuldu havt borið liðið.

Tað eydnaðist á ongan hátt at fáa føroyska liðið at spæla frameftir. Konseptið við at hava Julian Johnsson og Jónhard Frederiksberg sum arbeiðssamar síðuspælarar, sum samstundis skuldu hótta frameftir vøllinum, eydnaðist ikki.

Á sentrala miðvøllinum var tað spildurnýggi Pauli G. Hansen, sum vísti frægasta avrikið, meðan meiri royndu menninir vóru í so anonymir. Christian Høgni Jacobsen formáddi ikki at taka bóltin niður ella at fáa fríspørk, sum kanska kundu havt borið okkurt við sær. Og tá ið deyðbóltsstøðurnar endiliga vóru har, so vóru tær so syndarliga illa misnýttar, sum tað sjáldan áður hevur verið at sæð.

Verjan var undir øgiligum trýsti, og onkur teirra vísti seg á ongan hátt at hava kvalitetirnar, sum skulu til fyri at spæla á altjóða støði.

Sekkjapípurnar grenjaðu, kilturin var tikin av føroyingunum, og so er spurningurin, um tað fara at verða nakrir, sum fara at fáa sekkin!

## Vit vóru kanska ov djarvir

**– Kanska vóru vit eitt sindur ov djarvir í fyrra hálvleiki, og tað gekk betur at verja í seinna hálvleiki, heldur liðformaðurin**

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Liðformaðurin Óli Johannesen viðurkendi eftir tapið í Glasgow, at avrikið var ikki nøktandi.

– Hetta var ikki nóg gott. Innsatsurin var á góðari leið, tí tað sást betur, at vit royndu at stríðast. Hetta var avgjørt ikki tað, sum vit høvdu roknað við. Eg hevði heldur ikki roknað við, at tað skuldi ganga so galið ímóti Skotlandi, men skulu vit taka nakað positivt við, so var tað, at innsatsurin var betur hesaferð, sigur hann.

– Í fyrra hálvleiki gekk sera illa, men tað bleiv nakað frægari í seinna hálvleiki, tá ið vit trektu okkum eitt sindur longur aftur. Kanska vóru vit eitt sindur ov djarvir í fyrra hálvleiki, og tað gekk betur at verja í seinna hálvleiki, tá ið teir kanska eisini settu ferðina eitt sindur niður.

Føroyar hava nú tapt 6-0 í tveimum dystum á rað, og tað er ikki júst tað, sum liðformaðurin roknaði við fór at henda.

– Vit eru í holt við at byggja nakað nýtt upp, tað eru fleiri nýggir spælarar á liðnum, og vit hava roynt eina nýggja spæliskipan. Í dag kann mann ikki siga, at innsatsurin var ov lítil, tað kundi mann kanska sigast seinast. Hetta er nakað sum tekur tíð.

– Tað hevur gingið væl undan hesum dystunum, men nú vísir tað seg ikki at rigga heilt so gott, og tað er upp til venjaran at gera av, um nakrar justeringar skulu gerast, sigur Óli Johannesen.